# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Sólrun Lisberg Sumba:

## 30 ára starvsdag hjá heimarøktini í Suðuroy



1. apríl 1975 byrjaði Sólrun Lisberg sum heimahjálp í Sumba. Tá vóru ikki so nógv eldri fólk, ið høvdu brúk fyri heimahjálp, og tí var Sólrun bert til arbeiðis ein til tveir tímar um dagin.

Sólrun hevur altíð verið sera virkin innan heimarøktina í Suðuroyar sunnaru helvt. Hon hevur víst stóra virðing og áhuga, bæði fyri brúkarum, starvsfeløgum og fyri felagnum sjálvum. Hon hevur við stórum virði passað og pleygað hvønn brúkara upp á besta máta og altíð møtt upp til ymskar fundir, ið felagið hevur hildið.

Í 2001, 53 ár gomul, fór hon undir heilsuhjálparaútbúgvingina, ið hon kláraði sera væl, sjálvt um hon bert hevði vanligan fólkaskúla í Sumbiar skúla frammanundan.

Út yvir at hava starvast sum heimahjálp í Sumbiar kommunu, hevur hon eisini verið hjá brúkarum í Vági, og ígjøgnum hetta síðsta árið hevur Sólrun m.a. eisini arbeitt á Eldrasambýlinum í Vági.

Havnar leksikon:

## Ólavsøkan og ítróttarúrslit í 1937



*Manningin á Havnarbátinum, ið vann 10 mannafarsróðurin á ólavsøku 1937. Aftara rað f.v.: Ludvig Olsen, Arnold Ludvig, Herluf Hansen, Kristian Joensen, Johan við Stein (Polluks) og Petur Lindenskov.*
*Fremra rað f.v.: Chr. Ludvig Wilhelmsem, Martin Kúrberg, Jens Poulsen, Eliesar Johansen á Lag (Lilleba) og Emil Jacobsen.*

### Ítróttarúrslitini á ólavssøku 1937 vóru:

**Kappróður:** 4 mannafør gentur nr. 1 Sílið (Havn) nr. 2 Havfrúgvin (Vestmanna) 10 mannafør (gomul) nr. 1 Nótabáturin (Havn) nr. 2 Heiðabáturin (Havn) 10 mannafør (nýggj) nr. 1 Havnarbáturin nr. 2 Suðuroyingur nr. 3 Stangabáturin (Klaksvík) (gamli Havnarbáturin) nr. 4 Vestmenningur og nr. 5 Klaksvíkingur.

**Svimjing:** Ólavsøkuaftan (Svimlihylurin). **Vinnari:** Ásmund Olsen, Kollafjørður.

**Listarligt lop av vippu:** Sára Hansen (gentur) Bech (dani?) og Asbjørn Skarðhamar (menn)

**Svimjing ólavsøkudag (Eystara vág):** Judith, Gertrud og Maria Hammer av Tvøroyri (allar systrar), Laurentse Weihe, Sørvágur, Esther Zachariassen; Hvalvík, Mimi Lindal, Sandefjord.

**Menn:** Harry Bertholdsen, Vágur, Hans David Matras, Kirkja, Jacob Ellefsen, Miðvágur, Leivur Hansen, Ansgar Jensen, Hjørleif Hansen, Harry Rubeksen, Hans Karlo Viðstein, Willy Rasmussen og Andrew Petersen, allir úr Havn.

**Fótbóltur: B36-TB:** 1-1 og **HB-KÍ:** 1-2.

Um onkur av lesarum okkara hevur okkurt at viðmerkja í samband við ólavsøkuna í 1937, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon: 314647 / 273168

Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**

**Dagurin**

**31. mars. Balbina,** deyð umleið ár 120. Navnið var við í teimum fyrstu føroysku álmanakkunum, men er síðan lagt burtur. Hon var dóttir rómverska hermannin Kvirinus og bleiv tikin av døgum saman við pápanum.

MÓTTØKA

**Hósdagin 31. mars 2005 leggur Don Petersen, samskipari, frá sær á Fjarskiftiseftirlitinum vegna aldur.**

**Í hesum sambandi verður móttøka á Fjarskiftiseftirlitinum, Skálatrøð 20 millum kl. 15. 00 og 17.00.**

almannastovan

**Móttøka**

fríggjadagin 1. apríl 2005 kl. 15-17

Í sambandi við at tað 1. apríl 2005 eru liðin 30 ár, síðani Almannastovan varð stovnað og í sambandi við at nakrar av deildum Almannastovunar eru fluttar í nýggj høli, verður almenn móttøka á Smyrilsvegi 20 í Havn fríggjadagin 1. apríl 2005 frá kl. 15 til kl. 17.

almannastovan

**Bústovnurin Eirargarður**

verður 25 ár 1. apríl.

***Móttøka verður í hesum sambandi frá kl. 14.00–17.00.***

...

**Bú- og starvsfólk**

Lesið Sosialin -so eru tit við!